# Smyril Line rættiliga fingið vind í "seglini"

**Nevnd og stjórn í Smyril Line hava tikið týðandi avgerðir, sum skulu flyta føroyska reiðaríið væl fram á leið móti góðum fíggjarligum úrslitum komandi árini**

SMYRIL LINE
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samstundis, sum Smyril Line almannakunnger roknskapin fyri 2005, sum gevur 51 mió krónur í halli, vísir føroyska reiðaríið á, at týðandi stig eru tikin til at bøta um rakstrargrundarlagið hjá felagnum.

Ferðaseðlaprísirnir eru lækkaðir, nýggir inntøkumøguleikar eru skaptir, sparingar eru framdar, og arbeitt verður støðugt við at víðka og betra um inntøkugrundarlagið. Nýggja marknaðarføringin í Evropu vísir longu positiv úrslit, og sølan økist í stórum. Soleiðis eru útlitini hjá Smyril Line fyri árið í ár rættiliga góð.

Thomas Magnussen, stjóri í Smyril Line, sigur, at broytingarnar, sum framdar eru í fyritøkuni, longu í ár skulu fáa undirskotið burtur – og í 2007 skal avlop síggjast í roknskapinum.

Í stuttum vísir roknskapurin hjá Smyril Line í 2005 eitt hall upp á 51 mió krónur, men kortini er felagið í dag sera væl fyri fíggjarliga.

– Útvegaðar eru tilsamans 132,5 mió krónur í nýggjum kapitali, og tí stendur felagið trygt, sum stjórin tekur til.

Úrslitini hjá Smyril Line seinastu trý árini hava verið vánalig. Í 2003 hevði felagið 35 mió krónur í halli, í 2004 var hallið 24 mió, og nú í 2005 sum nevnt heilar 51 mió krónur.

Thomas Magnussen, stjóri, sigur, at hevði felagið ikki havt selt burtur av ognum sínum í 2004, hevði hallið hetta árið verið heilar 60 mió krónur.

Hinvegin háláðu tekniskir trupulleikar umborð á Norrønu, ótryggleiki rundan um felagið, óstøðug leiðsla og øktur rakstrarkostnaður úrslitið í 2005 negativa vegin.




*Smyril Line hevði 51 mió krónur í halli í 2005, men gongst, sum leiðslan í felagnum væntar, fer at standa upp og niður í ár Mynd: Jens Kr. Vang*

## Gongdin vend

– Við nýggjum kapitali og nýggjari skikkaðari leiðslu er kósin sett av nýggjum, og longu nú geva sølutølini fyri fyrsta ársfjórðing í ár ábending um, at árið fer at vignast væl.

Stjórin vísir á, at inntøkurnar frá ferðafólkum fyrsta ársfjórðing í ár eru meira enn tvífaldaðar í mun til í fjør.

– Taka vit páskatúrarnar í ár, hava 2.300 fólk higartil keypt ferðaseðil. Í fjør var talið minni enn 500 fólk. Soleiðis eru ábendingar um góðan inntøkuvøkstur í summar og restina av árinum, sigur Thomas Magnussen.

Í tíðindafundi á Smyril Line í morgun vísti Thomas Magnussen á, at lønar-og umsitingarsparingarnar hjá Smyril Line eru tilsamans 13 mió krónur, eins og økti farmaflutningurin er 17 mió krónur.

Tilsamans 30 fólk eru søgd úr starvi hjá felagnum; 20 fólk í 2005 og 8 fólk í ár.

Thomas Magnussen sigur, at farmaflutningurin, sum er ein týðandi partur av inntøkugrundarlagnum hjá felagnum, kastar nú meira av sær.

– Hetta er serliga eftir, at samstarvsavtala er fingið í lag við Smyril Blue Water. Avtalan tryggjar Smyril Line munandi meira í farmaflutningsinntøkum alt árið.

Stjórin sigur, at ætlaða samstarvið við Fjord Line fyribils er steðgað, tí felagið heldur ikki, at hetta fer at geva nakað serligt.

– Við at venda eyguni móti okkara egnu fyritøku, hava vit megnað at vent gongdini, soleiðis at árið í ár helst fer at hanga saman fíggjarliga, sigur Thomas Magnussen.

# Einskiljingar og stættarstríð á flokstingi

**Floksting Tjóðveldisfloksins verður hildið hetta vikuskiftið á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn undir heitinum »einskiljingar og stættarstríð«. Tjóðveldisfólk skulu á flokstinginum eisini taka støðu til, um Karsten Hansen skal halda fram sum næstformaður, ella um avbjóðarin, Annita á Fríðriksmørk, skal veljast í staðin**

FLOKSTING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin sigur í tíðindaskrivi, at evnini eru viðkomandi fyri samfelagið og koma eisini í avgjørdan mun at hava ávirkan á framtíðina hjá komandi ættarliðum. Gestarøðarar fara á flokstinginum at geva síni boð uppá, hvussu einskiljingarnar eiga at stingast út í kortið, og hvussu er statt við stættarstríðnum í Føroyum – fáa allir borgarar landsins ágóðan av ognum Føroya fólks?

–Tað verður skipað eitt sindur øðrvísi hesaferð; persónar, sum vit vanliga seta í samband við samfelagskjak um einskiljingar og stættarstríð, verða gestarøðarar – men fyri at gera kjakið enn meira áhugavert, fara persónarnir at býta um evni, soleiðis at Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðsgevarafelagi røður um einskiljingar og Jóhan Páll Joensen, stjóri røður um stættarstríð.

Flokstingið byrjar í kvøld kl. 19.30, og hildið verður fram leygarmorgunin kl. 9.00 Í kvøld verða flestu av teimum málum, ið skulu viðgerast sambært viðtøkum floksins, á skránni - m. a. val av starvsnevnd og næstformanni, har tvey eru í uppskoti, Annita á Fríðriksmørk og sitandi næstformaður, Karsten Hansen.

Eisini verða innkomin uppskot umrødd og avgreidd, eins og ársroknskapurin verður viðgjørdur. At enda fer gestarøðarin, Jón Tyril at røða um evnið: mentan og altjóðagerð; vit kenna Jón Tyril sum tónleikara og stigtakara til óteljandi mentanartiltøk kring landið – og ikki minst frá G! festivalinum, og spennandi verður at hoyra hann geva eitt boð upp á hetta áhugaverda evnið.

Fyrrapartin í morgin verður formansfrágreiðingin fyrst á



*Annita á Fríðriksmørk*



*Karsten Hansen*

skránni. Síðan verða viðgerð av formansfrágreiðingini og orðaskifti um politisk mál á skránni fram til á døgurða.

Kl. 13.00 leggur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelagi fyri sum gestarøðari og røður um einskiljingar - hvat siga fakfeløgini?

Kl. 15.00 fer seinni gestarøðarin henda dagin, Jóhan Páll Joensen, formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelagi at røða um stættarstríð - er stættarstríðið av ella er nýtt stættarstríð á veg?

Flokstingið endar klokkan kl.18.30

Kl. 19.00 verður hugnaløta við smyrjibreyði og tí, sum hoyrir eini hugnaløtu til.

## Fríari søla av øli og víni

**– Okkara rúsdrekkalóg má broytast, soleiðis at øl og vín kunnu seljast í ávísum supermarknaðum kring landið, og Rúsdrekkasøla Landsins eigur at verða einskild. Tað heldur Johan Mortensen, partaeigari í Restorffs Bryggjaríi**

RÚSDREKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Johan Mortensen, partaeigari í Restorffs Bryggjaríi, er ikki í iva um, at okkara rúsdrekkalóg als ikki er tíðarhóskandi og krevur munandi broytingar.

Hann fegnast um, at broytingar eru á veg í lógini, soleiðis at summarfestivalar kunnu selja øl.

– Men eg haldi avgjørt, at tað hevði verið upp á sítt pláss, at øl og vín eisini fingust til keyps í ávísum supermarknaðum kring landið.

Johan hevur eisini ta áskoðan, at fólk í ein ávísan mun sjálvi skuldu kunnað innflutt eitt sindur av øli og víni til egna n‡tslu – uttan, at hetta skal um Rúsdrekkasølu Landsins við tí risakostnaði, sum tá kemur oman á prísin.

– Soleiðis, sum skipanin er, er hon ikki brúkaravinarlig. Tað eru nógv fólk, sum av áhuga kundu hugsað sær at roynt ymisk sløg av øli og víni, men sum ikki hava henda møguleika undir verandi skipan.

**Rúsan privatiserast**

Partaeigarin í Restorffs Bryggjaríi, Johan Mortensen, heldur eisini, at Rúsdrekkasøla Landsins eigur at verða einskild, tí karmarnir um søluna eru alt ov trongir og ótíðarhóskandi.

– Sølan kundi í fyrsta lagi verið yvirtikin við somu skyldum um avkast til landskassan, sum skipanin við Rúsdrekkasølu Landsins hevur í dag. Men ein einskild rúsdrekkasøla, hevði avgjørt verið meira kundavinarlig enn almenna sølan, sum vit hava í dag, heldur Johan Mortensen.